# Sjúrður Højgaard og »Guds« orð

GUNNAR ISFELD
lesandi

Góði Sjúrður. Jesus segði ongantíð nakað um samkynd! So legg tú ikki tíni orð í hansara munn!

Tú sigur eisini, eftir at hava siterað úr PAULUSAR brævið til Korinthmanna, at tað er Guds orð. Eg veit, at hetta er als ikki óvanligt; men um so er, má øll Bíblian vera Guds orð ikki so? Í so fall er tað heldur ikki rætt, tá tú sigur »Og Guð broytir ikki meining!« Tí tað eru jú ein rúgva av ósamsvari í Bíbliuni millum Gamla Testamenti og Nýggja. Á ein hátt kann sigast, at tað er júst tí, tey verða kallaði Gamla og Nýggja.

Eitt dømi er í 1. Mósebók, 17. kap., at tað varð álagt, ófrávíkiliga, at menn skulu umskerast, og at tað skal galda altíð sum tekin um sáttmálan millum Gud og Ábraham og hansara avkom. Í versi 14 stendur enntá:

»Men **hin óumskorni**, hann, sum ikki er umskorin á holdi yvirhúðar sínar, hann skal verða oyddur úr tjóð síni; **hann hevur slitið sáttmála mín.**«

Ja so sigur Gud í Gamla Testamenti (GT). Nakað heilt annað síggja vit í Nýggja (NT). Serliga hjá Paulusi (sí serliga Galatarabrævið).

Vit kunnu eisini peika á eina rúgvu av øðrum dømum. Eisini innan NT er ósamsvar. Tak t. d. munin á Paulusi og Jákupi viðv. trúgv aleina ella trúgv & gerðir (Gal og Ják, 2, 14 - 26); og innan Paulusar brøv eru eisini nøkur ikki serliga samljóðandi dømir: hann sigur fleiri ferðir, at sølibat er tað besta, men í 1. Timotheus vil hann helst hava, at fólk gifta seg.

Tað sær út til, at Gud gott kann broyta meining. Ella kanska skulu vit júst royna at leita eftir **Guds** orði í Bíbliuni, sum jú er skrivað av monnum.

Er títt uppskot tað, at NT er Guds orð? Tú sigur jú einaferð, at ongin skal koma og siga, at hetta (tín sitering av Paulus) stendur í GT, tí tað stendur í NT. Hetta er jú ein greið ábending um, at tú leggur størri dent á NT. Men so kann øll Bíblian ikki vera Guds orð Ha? Tí: mugu vit ikki lurta eftir øllum tí, sum Gud hevur at siga?

Altso:

Tað er óheppi at kalla alt, sum stendur í Bíbliuni, fyri Guds orð.

Paulus er ikki Gud.

Jesus segði einki um samkynd (tað vit vita um).

# Fotografurin, journalisturin og hin rættvísi Lot

JENIS AV RANA



Farna mikudag prátaði eg við tveir danir, fotograf og journalist frá sjónvarpinum hjá DR. Hesir gera sending um m. a. viðurskifti, ið gera Føroyar til eina sermerkta tjóð í norðurlendskum høpi. Teir høvdu verið í Føroyum í 8 dagar, tosað við nógv fólk, tó øll úr meginøkinum. Spurdir høvdu teir onga frágreiðing um, hví hugsanir norðoyinga, suðuroyinga og sandoyinga ikki høvdu áhuga teirra.

Av mongum áhugaverdum høvdu teir fest seg við, at mong mettu Føroyar at vera tað nærmasta, tú kemur paradís á jørð. Hinvegin høvdu teir, her í Føroyum, lært, at Guðsmaðurin Lot var ein brotsmaður, tí hann: »havde drevet blodskam med sine døtre«. Eg sá tað tí sum ein forrætt at kunna siga teimum alla søguna um »tann rættvísa Lot«, sum dag um dag píndist av skammleysa atburði hina gudleysu. Um hvussu hann livdi so við Gudi, at hann og døturnar báðar vórðu einsamallar eftir, tá ovurhonds synd hevði volt deyða allra teirra, tey livdu ímillum. Og eisini hoyrdu teir frásøgnina um, hvussu fyrst onnur og síðani hin dótturin, fyri »at fáa avkom«, gjørdu seg inn á Faðir sín, góvu Honum at drekka og lógu hjá honum. Um tað lesa vit m. a., at hann ( Lot ): »sansaði hvørki, táið hon legði seg, ella táið hon fór uppaftur«.

Sjáldsamt at danir, enntá úr Bíbliuni, fáa skeivt endurgivið frá føroyingum!

Annars er søgan um Lot, umframt ein áminning um, hvussu álvarsliga Gud sær upp á synd, ein fantastisk frásøgn um kærleika og trúfesti Guds til tann, ið velur at liva lív sítt í áliti á lyfti Hansara. Hevur tú ikki lisið hesa frásøgn, fari eg at viðmæla tær at gera tað - hon er skjótt lisin. Tú finnur hana í 1. bók Mósesar, seinnu helvt av kap. 18 og allan kap.19. Viðmerkingar Pæturs, í 2. Pætursbrævi kap. 2 frá ørindi 6, eru eisini verdar at lesa.

# Gevið keisaranum tað, ið keisarans er og Guði tað, ið Guðs er

ÍVAR I VERSEN



Gevið keisaranum tað, ið keisarans er og Guði tað, ið Guðs er, segði Jesus, tá skriftlærdir royndu at fáa hann í felluna.

Jenis av Rana og faktotum hansara, Bill Justinusen, skulu hava alt, so sum sjón – ella helst hoyrn – gongur fyri søgn, tykir tað mær.-

Hetta skiltist av orðaskiftinum á løgtingi, ið varpað varð út á teimum rásum, vit hava til taks. Hvørt teir meta seg saman við keisaran ella tann **almáttuga** kunnu áhoyrararnir sjálvir meta um. Í hvussu so er tóktist tað mær, at teir báðir høvdu einki at ivast í – sambært orðaskiftinum: Alt sum bendir frá kós teirra, fór lúskt niður og norður! – Óhugnaligt er tað - sera óhugnaligt. At hesir inkvisitorar eins og í svartastu miðøld tykjast at fáa so stóra undirtøku millum eitt fólk, ið metir seg at vera mentað – fyri ikki at siga hámentað – er ilt at skilja.

Klappus kemur eftir tykkum, fara tit oman í Urð, uttan at onkur hevur eyguni eftir tykkum, var ein vanlig ávaring til okkara smábørn í 1930-40 árunum í Kvívík, tá vit leitaðu okkum oman at sjóvarmálanum at fiska murtar og hugna okkum. – Klappus var ein ræðumynd. Hesin sami klappus kemur helst eftir øllum, ið víkja frá hugburði teirra beggja – Jenis og Bill. Alla náttina eftir orðaskiftið á tingi, segði onkur mær, hevði hendan lindisrásin válkað sær í síni eggjan at fáa allar sínar proselytar at vísa fra sær alt, ið víkur frá áskoðan teirra. Óhugnaligt – sera óhugnaligt!

Kjarnin í málinum er, at tveir ella tríggir tinglimir hava lagt fram eitt uppskot um vernd teirra í minniluta. Hvør ella hvørji eru hesi í minniluta ? Í hesum føri eru tað tey samkyndu..

Finnur Helmsdal, Anita á Fríðriksmørk, Heidi Petersen og onnur tignarlig fólk úr øðrum flokkum, hava talað søk teirra í minniluta, ið søkt verður at. Virðiliga og sáttliga bóru tey fram sjónarmið síni.

Eru vit veruliga flutt aftur í miðøld? Ilt er at samanbera; men talebanar og víðgongdir fundamentalistar í miðeystri spreingja seg sjálvar og onnur í luftina til tess at koma í Himmiríki.

Hástórir og sjálvrættvísir fettu Jenis og Bill sær afturá á tingsins røðarapalli. Teirra var sjálvrættvísin eyðsýnd, sum eisini Gerhard Lognberg skeyt seg undir. HARRIN miskunni okkum. Tað hava vit hvønn dag og hvørt kvøld fyri neyðini at biðja.

Lítið á leið tykist mær at vit eru komin, tá eitt mentað fólk, vit kalla okkum, gevur tílíkum fólki so stóra undirtøku. Einki tykist at rína við tey, og sjálvrættvísin lýsir av andliti teirra. – Nógv av lýsingarorðunum havi eg sambært pressulógini í hesum høpi ikki loyvi til at nýta.

Kortiliga liggja tey á mær sum knívur á hørðum horni.

Teir helma ikki í! Tað seinasta ið hoyrdist í tíðindunum í útvarpinum í vikuni var uppskot teirra um at herða rúsdrekkalóggávuna. Nú skulu Ívar og aðrir læra at haga sær. Teir skulu ikki sleppa at smakka sær á fyrr enn nakað væl er liðið á dagin. Helst skulu teir verða koyrlaflongdir alment á Vaglinum, har Jenis og Bill eru profossar(teir ið útinna revsingina).

Kanska tráa teir eftir at gerast halgimenni. Verður lagt nóg ofta eftir teimum, halda teir seg ivaleyst hava vunnið spælið. –.

*Á Heiðaskákinum*
*í november 06*

# Inspirering, involvering og informering = **motivering**

*Bergun Kass*
*(bergun@post.olivant.fo)*

**Tankar** – aftan á eina sera góða ráðstevnu í Norðurlandahúsinum 9. november 2006 undir heitinum **»kreativitet, innovation og upplivingarbúskap«.**

Hvussu fáa vit fjølbroytni inn í arbeiðslívið?

Vit her nú kunnu byrja
Ja, bara við at spyrja
Hví møttu so fáir stjórar
og nevndarhetjur stórar?

Tó, ein fjølbroytt mannamúgva
(Sær) á breiðum hugaveingjum smúgva
Vælkomin! – við evnum øllum
og kreativum bjøllum

Tá framburð tú skalt inna
hjá fólki eins og vinnu
Tú byrja má í toppi
og seta nevnd og stjórn við luppi

Tað gamla vanabundna
Í Føroyum -vit enn blunda
Fyri margfaldni í leiðslu
vit fáa helst ábreiðslu

Tann fakligheit sum dygd
Á nógv í dag er bygt
Vit leita eftir virðum
Í vøggugávu-'byrðu'

Nú tosa øll um HR
Man tað bara vera PR?
Um ikki hugburð rætta
Tú lítið gott vil frætta

Tann headhuntarin stóri
-Dan Meiland, sigur um stjóra
"Har einki við at gera
EQ'ið stórt skal vera". *
-----------------------------

* EQ (Emotional Intelligence)

Um ikki evni ríku
at síggja stórt í ólíku
Hasard við sálir spælir
og mannalagnur kæru

Tað poppar upp sum froskar
orð og virðir tómir flosklar
Tá fjalir seg essensur
HR – tí 'blørukonsistensur'

Tað er tí mín áheitan
eftir rætta fólki leita
Annað er bara bluff
Sum at pissa í buksurnar –huff huff

Tað gevur løtuvinning
tá eingin samanspinning
av lívsvísdómi og 'gestum'
við kreativum kreftum

Løtur gamlar leiti upp
minnist Rip og Rap og Rup
Í Disney verð at kyrja
teir tíðum Gearløs spyrja

Mín vón um framtíð fróa
og starvs- og lívsdygd góða
"Lat arbeiðsfólkið tosa,
liva, skapa og so brosa".
-----------------------------

PS: Inspirering, involvering og informering = **motivering (motivatión)** kensluligur 'intelligence'